Dagfesting: 22.11.2024
J.nr. 22/00309
Skrivað hevur: LJ

# Reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús í Fuglafjarðar kommunu

§1.

Stk. 1. Umsókn um grundstykki í Fuglafjarðar kommunu skal latast kommununi skrivliga.

Stk. 2. Tilskilast kann í umsókníni í hvørjari bygd, grundstykki ynskist. Umsøkjarin fær tá bert boðið grundstykki, sum eru tøk í tilskilaðu bygdini/ bygdunum.

Stk. 3. Er einki tilskilað í umsókníni um, í hvørjari bygd, grundstykki ynskist, fær umsøkjarin boðið grundstykki í teirri bygd í kommununi, har grundstykki eru tøk

§2.

Stk. 1. Fyri at vera settur á bíðilistan, skal umsøkjarin vera fyltur 18 ár.

Stk. 2. Umsøkjari, sum longu eigur kommunalt grundstykki í Fuglafjarðar kommunu ella sum er giftur við ella livur saman við persóni, sum eigur kommunalt grundstykki í Fuglafjarðar kommunu, kann ikki verða uppskrivaður á bíðilistan.

§3.

Stk. 1. Umsøkjari, sum lýkur treytirnar í §2, verður settur á bíðilistan, tá viðkomandi hevur sett 10.000 kr. í veð. Peningurin verður goldin til Fuglafjarðar kommunu.

Stk. 2. Upphæddin, sum rinda verður í veð samb. stk. 1, verður góðskrivað umsøkjaranum, tá ið viðkomandi keypir grundstykkið frá kommununi.

Stk. 3. Velur umsøkjari at taka seg av bíðilistanum, verður upphæddin, sum rinda er í veð, afturgoldin uttan rentu.

§4.

Stk. 1. Um grundstykki er tøkt, verður tað boðið umsøkjaranum, ið stendur fremst á bíðilistanum. Tekur viðkomandi ikki av, verður stykkið boðið tí, sum stendur næst á bíðilistanum, og soleiðis frameftir.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Stk. 2. Tekur umsøkjari ikki av tilboð um kommunalt grundstykki tríggjar ferðir á rað, verður viðkomandi fluttur aftast á bíðilistan.

§5.

Stk. 1. Bíðilistin til grundstykkir hjá Fuglafjarðar kommunu verður umsitin av kommunalu umsitingini, sambært hesi reglugerð.

§6.

Tekniska nevnd saman við fíggjarnevndini kann í heilt serligum førum loyva fráviki frá reglugerðini.

Samtykt á býráðsfundi hin 31. Oktober 2024

**Dávur Juul**
*Borgarstjóri*
Í Støð 5
530 Fuglafjørður

Dávur Juul, borgarstjóri